## Setrið á ferð: Risiko og trygd í samfelagnum

**Firouz Gaini, antropologur, fer at halda níggju og fjørutiundA fyrilesturin í røðini »Setrið á ferp«, sum verður á bókasavninum í Klaksvík týskvøldið 18. apríl kl. 20**


*Firouz Gaini*

SETRIÐ Á FERÐ
*Tíðindaskriv*

Tá fer Firouz Gaini, antropologur at halda fyrilesturin »Risiko og trygd í samfelagnum. Nýggj sosiologisk sjónarmið«.

Týski sosiologurin Ulrich Beck sigur okkum liva í einum risikosamfelagi, har øll royna at tryggja sær ímóti óvissum og vandum, ið tó eru vorðin partur av gerandisdegnum. Samfelagið roynir áhaldandi at basa ótryggleikum, fáa tamarhald á øllum tí óvæntaða, men tað globala risikosamfelagið gongur sínar egnu leiðir. Hugtakið risiko umfatar her alt frá náttúruvanlukkum, fólkaheilsu, terror, kríggj og altjóða fíggjarkreppur.

Firouz Gaini er antropologur, granskari og høvundur. Hann er útbúgvin á universitetunum í Oslo og Keypmannahavn, men hevur síðan 2001 verið knýttur at Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

## Týskur hermaður á Torginum í Rás 2

ÚTVARP

Walter Schneider, týski hermaðurin frá seinna heimsbardaga, ið gjørdist føroyingur.

Undir hertænastu síni í Danmark 1944-45 hitti Walter eina unga føroyska gentu, ið gjørdist kona hansara. Tey búsettust í Føroyum í 1949.

84 ára gamli Walter greiðir í sendingini frá barnaárum og uppvøkstri í Týsklandi, krígsárunum og lívi sínum til dagin í dag. Sendingin verður send leygardagin 8. apríl kl 13 á Rás 2. Svenning av Lofti leggur til rættis.

## Landið fær 40 mió kr frá Føroya Tele

**Aðalfundur hevur verið í Føroya Tele samtakinum, har ársroknskapurin fyri 2005 varð lagdur fram og góðkendur. Landið fær 30 mió kr í vinningsbýti og 9,6 mió kr í skatti**

VINNINGSBÝTI

Samlaðu inntøkurnar hjá samtakinum vóru 307,2 mió. kr. í 2005, meðan úrslitið gjørdist 50,1 mió. kr. eftir, at 9,6 mió. kr eru settar av til skatt.

Á aðalfundinum varð avgjørt, at 30 mió. kr. verða goldnar partaeigaranum, t. e. Føroya Landsstýri, sum vinningsbýti. Eginpeningurin í felagnum var 331 mió. kr. við árslok 2005.

Á aðalfundinum fór Tage M. Iversen úr nevndini og inn kom Rikke Berg Larsen. Rikke Berg Larsen er verkfrøðingur og starvast dagliga á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Í nevndini eru:
Hákun Steingrímsson, formaður
Reidar Nónfjall, næstformaður
Rikke Berg Larsen
Ulla Steenberg, starvsfólkavalt umboð
Janus Djurhuus, starvsfólkavalt umboð

# Trupult at skyna á, hvør er stakur

**Trupulleikar, við at allýsa hvør er stakur uppihaldari, var orsøkin til, at ein meiriluti í Løgtinginum valdi at vraka eitt uppskot um at tvífalda barnafrádráttin fyri stakar uppihaldarar**

POLITIKKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í aðru viðgerð í gjár av uppskoti hjá Tjóðveldisflokkinum um at tvífalda barnafrádráttin hjá støkum uppihaldarum, kom fram, at við verandi skrásetingum tykist trupult at fáa hugtakið 'stakir uppihaldarar' allýst. Hetta gjørdist grundgevingin til at eini meiriluti í Løgtinginum valdi at fella uppskotið.

Fíggjarnevndin hevði undir viðgerðini av málinum fund við Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Hagstovnuna, Bárð Nielsen, landsstýrismann í fíggjarmálum, Hans Paula Strøm, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum, og Annitu á Fríðriksmørk, løgtingsmann, og øll tyktust samd um trupulleikan í at lýsa, hvør er stakur uppihaldari, og hvør ikki er.

### Samd men ósamd

Hóast øll fíggjarnevndin tyktist samd um, at nógvar góðar grundir eru fyri at gera tiltøk fyri summar stakar uppihaldarar, og øll nevndin var eisini samd um, at tað kan vera ringt at fáa hugtakið 'stakur uppihaldari' allýst og tí trupult at fáa teir røttu persónarnar at verða umfataðir av uppskotinum. So býtti fíggjarnevndin seg í ein meiriluta og ein minniluta.

### Ov stór umsiting

Meirlutin við Anfinni Kallsberg, Vilhelmi Johannesen, Kaj Leo Johannesen og

Lisbeth L. Petersen helt, at hetta fór at krevja munandi umsiting, ið ikki hoyrir heima hjá skattavaldinum, men er eitt almannamál. Tí mælti meirilutin tinginum Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin við Kára P. Højgaard, Páll á Reynatúgvu og Karsten Hansen helt somuleiðis tað verða óheppið, um hetta varð lagt til Toll & Skatt at umsita, men sá hinvegin ikki teir stóru trupulleikarnar í at lata almannaverkið umsita eyðmerkingin av, hvørjir persónar skulu verða umfataðir av rættinum til dupultan barnafrádrátt. Tí mælti minnilutin Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

### Øll vita, hvat ein stakur uppihaldari er

Í tingviðgerðini funnust Bill Justinussen og Jenis av Rana at meirilutanum, fyri ikki at hjálpa einum bólki, ið, øll tykjast samd um, hevur tørv á hjálp, orsakað av, at onkur, ið ikki hevur rætt til hesa hjálp fer at misbrúka skipanina. Bill Justinussen segði, at hann vónaði, at samgongan fór at taka stig til, at hesin bólkur varð hjálptur í almanna skipanini, um tey feldu hetta málið. Bill Justinussen vísti á, at øll vita, hvat ein stakur uppihaldari er. T átti tað ikki at vera so trupult at viðtikið hetta mál. Høgni Hoydal helt, at tað var merkisvert, at samgongan skuldi allýsa júst hetta mál, so væl, tá hon í so nógvum øðrum førum tók avgerðir uttan nakra sum helst allýsing. Bill Justinussen vísti eisini á, at um onkur fekk pening av órøttum, so kundi landið krevja pening aftur.

### Undanførslur

Annita á Fríðríksmørk og Jenis av Rana mettu, grundgevingarnar hjá meirilutanum at vera undanførslur, tí at tey í veruleikanum ikki ynsktu at hjálpa teimum veikastu. Annita á Fríðríksmørk vísti á, at tá meirilutin velur at vraka hetta uppskotið, tí at tað ikki er skattamál, men samstundis ikki heitur á Landsstýrismannin í almannamálum, um at taka málið upp, so tykist meirilutin ikki áhugaður í at loysa trupulleikan fyri henda bólk. Hon helt tí manglandi allýsingina vera ein stóran trupulleika, ið átti at verða loystur sum skjótast. Hon spurdi eisini, um hvat samgongan ætlaði at gera fyri at fremja hesa allýsing.

Lisbeth L. Petersen vísti atfinningunum hjá Annitu á Fríðríksmørk og Bill Justinussen aftur, hon vísti á, at bólkurin einsamallur uppihaldari mátti lýsast fyrst, soleiðis at býtið varð rættvíst. Tí lóggávan skal innrættast soleiðis, at hon rakar tey, ið veruliga hava ein tørv.

### Leitaði eftir semju

Páll á Reynatúgvu harmaðist um harða orðavalið, ið kjakið hevði verið merkt av. Hann heitti á tingið, um at arbeiða víðari og royna at finna semju í hesum málinum, sum snýr seg um tey veikastu í samfelagnum, hann var sannførdur um, at allir tingmenn hava áhuga í at hjálpa hesum bólki.

# Eimskip keypir flutningsfelag á landi í Føroyum




**P/F Heri Thomsen, sum er eitt felag undir Eimskip í Føroyum, hevur keypt Farmaleiðir, flutningsdeildina á landi hjá Strandfaraskip Landsins**

FARMAFLUTNINGUR
*Tíðindaskriv*

Strandfaraskip Landsins er eitt felag, sum landið eigur og sum rekur farma- og ferðafólkaflutning á sjógvi og landi í Føroyum. Sølan av Farmaleiðum er størsta einskiljingarverkætlan, sum er framd í Føroyum higartil.

Flutningurin á landi hjá P/F Heri Thomsen og hjá Farmaleiðum verða nú lagdir saman undir navninum Farmaleiðir. Samanlagt verður hetta størsta flutningsfelag á landi í Føroyum. Farmaleiðir fer at veita eina umfatandi tænastu innan bingjuflutning, trailaraflutning, flutning av plattum og smápakkum. Tænastan fevnir um køli- og frystiflutning, flutning av feskum og frystum fiski og saltfiski. Virksemið fer at verða knýtt saman við altjóða netverkið hjá Skipafelagnum Føroyar og Eimskip – sum er móðurfelagið hjá Skipafelagnum. Skipafelagið varð stovnað 1919 og hevur síðani verið leiðandi flutningsfelag í Føroyum. Við samanleggingini við Skipafelagið Føroyar og P/F Heri Thomsen og nú Farmaleiðir, er Eimskip ført fyri at veita eina víðfevnandi tænastu innan flutning og logistik til føroyska marknaðin.

Rakstrarinntøkan hjá Farmaleiðum var í 2005 20 milliónir kr. Felagið rekur 19 lastbilar í ymiskum støddum, harafturat nakrar vørubilar, trailarar og gaffiltrukkar. 21 fólk hava starvast hjá Farmaleiðum.

### Um Eimskip

Eimskip veitir heildarloysnir innan flutningstænastur. Flutningskervið fevnir um 54 skrivstovur í Evropa, Norðuramerika, Suðuramerika, og Asia, umleið 30 skip og 15 frystihús. Eimskip eigur somuleiðis nøkur dótturfeløg og er í samstarfsfelagsskapum.

### Um Avion Group

Avion Group er móðurfelagið hjá Eimskip, og er eitt holdingfelag, sum hevur serkunnleika í altjóða flutningi. Samtakið rekur 85 skrivstovur um allan heim og hevur umleið 4.500 fólk í starvi. Avion Group veitir sínum kundum álítandi, skjótar og kappingarførar heildarloysnir innan futning.